

BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

# SUNT LÍV

## SAMANDRÁTTUR

FRÁSØGN UM BURÐARDYGD 2022

www.bakkafrost.com/sustainability



# Um Bakkafrost

**BAKKAFROST:** Stovnað í 1968.
**Staðseting:** Høvuðssæti í Føroyum: Glyvrar, Eysturoy
**Framleiðsla og beinleiðis søla til fyritøkur:** laksur, pakkitilfar, biogass, fiskamjøl, biotøð, niðursjóðaðar fiskavørur og rognkelsisaling.
**Longstu samanhangandi virðisketuna í vinnuni:** Dótturfeløg (100% ognarlutur): Havsbrún, Fuglafjørður (framleiðsla av mjøli, lýsi og fóðri); Bakkafrost Scotland (skotskur laksaframleiðari, víðarigóðsking og søla); Bakkafrost UK, Grimsby (laksainnflutningur og søla); Bakkafrost USA, New Jersey (innflutningur av sjógæti, framleiðsla og søla); FÖRKA, Tórshavn (biogassverk), Bakkafrost France (laksainnflutningur og søla), Munkebo Seafood (niðursjóðing av fiskavørum og søla) og Svínoyar Rognkelsisstøð (aling av Rognkelsum)
**Skrásett:** Á keypsskálanum í Oslo (Oslo Børs) við eyðmerkingini BAKKA
**Starvsfólk:** 1.778 ársverk

**Virðisketan**



| | FISKAMJØL | LÝSI | ALIFÓÐUR | LÍVFISKUR | SMOLTSTØÐIR | BIOGASS | ALING | FSV | KRYVJING | VIRÐISØKING | PAKKING | SØLA & FLUTNINGUR |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Framleiðsla** | **164.000t** um árið | **110.000t** um árið | **255.000t** um árið | Alsamt meira rogn úr okkara egnu stovnum | **20 mió** 500g & **11 mió** 250g um árið í 2023 | **90-100.000t** um árið | **57** alibrúk í nýtslu | **8** tænastuskip | **90.603t** av laksi tikin í 2022 | **140.000t** kruvt & **40.000t** av virðisøktum vørum um árið | Kassar til **80,000t** av laksi um árið | **7.130 mia** kr. í nettosølu |

**Virðisskapan**

- Vit skapa virðir til okkara partaeigarar, til Føroyar og Skotland við skattum og beinleiðis og óbeinleiðis starvsmøguleikum
- Vit nøkta vaksandi eftirspurningin eftir proteinum við heilsugóðum og effektivt framleiddum laksavørum
- Vit miða ímóti at geva okkara íkast til betri undirstøðukervi í økjum har vit hava okkara virksemi
- Vit virka saman við havbúnaðarvinnuni til at fremja ábyrgdarfullar og burðardyggar siðvenjur

(Sí fíggjarligu úrslitini hjá samtakinum í Ársfrásøgnini á www.bakkafrost.com)

# Hæddarpunkt í 2022

Vav 1 og 2-útlátið fyri samtakið hækkaði 13%, sum er

**0,5%**

**hækking pr. tons av seldum vørum**

**-8%**

**minking av vav 3-útláti pr. tons av seldum vørum**

Framúr lívfrøðiligt avrik í Føroyum, har

**95%**

**av fiskinum kom undan**



Fingu nýggja brunnbátin Bakkafossur, ið tekur 7.000 m³.

**Søguliga lág lúsatøl** í Føroyum og í Skotlandi.

| | |
|---|---|
| **0,28** | **0,22** |
| FØROYAR | SKOTLAND |

edie awards

**Tilnevnd til eina edie Sustainability Awards-heiðursløn gjøgnum okkara luttøku í átakinum Burðardygt Vinnulív**



Fingu okkara fyrstu elriknu tvíkilju, "Grønarók".



Fingu ein nýggjan 4.000 m³ stóran brunnbát í Skotlandi

# Top 2023-mál úr Bakkafrost Sunt Lív-ætlanini

Okkara missión er at framleiða sunnan og burðardyggan laks í heimsflokki. Við at gera íløgur í okkara fyritøku, okkara starvsfólk, okkara laks, okkara umhvørvi og í lokalsamfeløgunum, har vit hava okkara virksemi, kunnu vit geva milliónum vit kunnu geva milliónum av fólkum møguleika fyri at liva eitt sunt lív. Í okkara Sunt Lív-ætlan finnur tú øll okkara mál innan burðardygd á einum stað.




- Gera íløgur í týdningarmiklar førleikar sum grundarlag fyri at skapa burðardyggan vøkstur
- Økja gjøgnumskygnið, hvussu vit skapa virði í lokalsamfeløgum
- Kunna týdningarmiklar áhugapartar um fyrimunirnar við laksaaling
- Áhaldandi gera íløgur gjøgnum 'Sunt Lív'-grunnin í Føroyum og 'Community Fund' í Skotlandi

- Minka vav 1 og 2 $CO_2$ spor við 50% innan árslok 2030
- Nullútlát innan árslok 2050
- Halda fram at granska í burðardyggum tilfeingi til fóðurframleiðslu
- Hava omanfyri 97% vatnendurnýtslu á øllum smoltstøðum

- Smolt á 500g
- Fóðurfaktor <1,05 í Føroyum og 1,15 í Skotlandi
- Viðgera uttan antibiotika
- Økja talið av laksi, ið kemur undan upp á > 94% í Føroyum og >88% í Skotlandi

- Røkka framhaldandi organiskan vøkstur
- Hægsta rakstraravlop per kg framleiddan laks í Skotlandi
- 150.000 tons kruvdan laks árliga í 2026
- 180.000 tons framleiðsluorku við árslok 2026

- Eitt samtak
- Íverkseta innanhýsis átak fyri at fremja burðardygga atferð atferð
- LTIR minni enn 5 í øllum samtakinum
- Ongar deyðatilburðir

Fá meira kunning um okkara Sunt Lív ætlan á síðu 12 í okkara Healthy Living Sustainability Report 2022.

# Laksaaling, ein burðardygg loysn

Dagsins matarvøruskipanir standa yvir fyri ómetaliga stórum avbjóðingum, so hvørt sum fólkatalið í heiminum veksur og leggur eitt øgiligt trýst á matvørutilfeingið. Um vit skulu útvega mat til 9 milliardir fólk í 2050, mugu vit leggja dent á at byggja upp burðardyggar matvøruskipanir við minst møguligari slóð, sum varðveita klótuna til framtíðar ættarlið.

Havbúnaður verður sæddur sum ein burðardygg loysn at nøkta vaksandi tørvin eftir føðsluríkum proteinum til vaksandi fólkatalið í heiminum. Alilaksur telist millum sunnastu proteinkeldurnar orsakað av høga innihaldinum av omega-3 feittsýrum, D-vitaminum, Selen og B-vitaminum.

Havbúnaður er tað mest burðardygga valið fyri brúkaran, samanborið við onnur ald protein. Aldur laksur hevur lutfalsliga lágt $CO_2$ útlát, tá man samanber teir fýra størstu bólkarnar av djóraproteini: laksur, høsnarungi, svínakjøt, neytakjøt og lambskjøt. Proteinvarðveitslan í laksi er tvær ferðir so høg sum í neytakjøti. Alilaksur hevur eisini tann lægsta fóðurfaktorin og lægsta árin á vatn samanborið við hinar bólkarnar av djóraproteini.

Ábyrgdarfull laksaframleiðsla við fokus á at minka møgulig neilig umhvørvislig árin er loysnin at tryggja framtíðar ættarlið sunn og umhvørvisvinarlig protein.

## Vaksandi fólkatal..

200 ár síðani

**1 mia**

2022

**8.0 mia**

2050

**9.7 mia**

## tørvar størri tilfeingi..

Til taks



Tørvur í 2050



**70%**
**meiri tørvur á proteini**

## Burðardygt framleiddur laksur er mest effektiva animalska proteinið viðvíkjandi gagnnýtslu av tilfeinginum




**Laksur hevur ein týdningarmiklan leiklut at metta tað vaksandi fólkatalið í heiminum**

# Bakkafrost og ST málini fyri burðardygga menning

ST setti á skrá 17 heimsmál fyri samfelags-, umhvørvis- og búskaparframgongd ímillum 2015 og 2030. Málini hava til endamáls at viðgera størstu avbjóðingar og møguleikar dagsins samfeløg standa yvir fyri í dag.

Á Bakkafrost síggja vit málini sum umboðandi væntanir til altjóða spurningar hjá stórum parti av okkara áhugapørtum, og vit hava brúkt tey sum týðandi part av grundarlagnum fyri metingina fyri okkara Sunt Lív ætlan fyri 2023. Undir okkara strategisku ætlanartilgongd vístu vit til partar av Future-Fit Benchmark, sum er sniðgivin til at gera SDG málini til veruleika.

Vit hava gjørt eina meting av SDG málum í mun til okkara virksemi fyri at síggja, hvat er mest viðkomandi fyri okkum. Vit hava skilt ímillum økir, har tað er møguleiki fyri størri og minni ávirkan og økir, har vit hava skyldu til at minka um møguliga neiliga ávirkan.

Niðanfyri sært tú, hvussu vit hava mett um okkara íkast til málini.

Vit fara framhaldandi at gera okkara besta fyri at røkka hesum málum.

HEIMSMÁLINI

## Stór jalig ávirkan




## Avmarkað jalig ávirkan




## Linna neiliga ávirkan




Fá meira at vita á síðu 13 í okkara Healthy Living Sustainability Report 2022

# Limaskapir og styrkitøl

THE GLOBAL COMPACT
WE SUPPORT

## SJÁLVBOÐIN KUNNING

Ocean Disclosure Project

## STYRKITØL Í 2022

| | |
|---|---|
| CDP | B |
| FAIRR – A COLLER INITIATIVE | 6 |
| SUSTAINALYTICS | 26.8 |
| MSCI ESG RATINGS (BBB) | A (á einum stiga frá AAA til CCC) |
| S&P Global | 43 |
| ESG100 | A |
| EURONEXT | Partur av nýggjum burðardygdsindeksi á keypsskálanum í Oslo |

## HEIÐURSLØNIR Í 2022

BURÐARDYGT VINNULÍV

Í 2022 varð Burðardygt Vinnulív, sum er eitt samstarv millum Bakkafrost og 11 aðrar fyritøkur, tilnevnt til edie Sustainability Awards 2023 í bólkinum Ársins Partalag og Samstarv.

SEAFOOD Excellence

Bakkafrost Native Hebridean Scottish Smoked Salmon fekk heiðurslønina "Best New Foodservice Product" tillutað til átakið 2022 Seafood Excellence Awards á Seafood Expo North America (SENA) í Boston.

Excellence Awards 2023

Bakkafrost Scotland vann eisini tvær aðrar stórar heiðurslønir til Scotland Food & Drink Awards 2022. Native Hebridean Smoked Scottish Salmon vann høvuðsheiðurslønina "Ársins vøra" umframt "Artisan Product of the Year".

gastro

Í desember 2022 tilnevndi danska blaðið "Gastro" roykta laksin hjá Bakkafrost sum "Best í test". Laksurin varð mettur at vera bestur í eini samanbering, har átta ymiskar royktar laksavørur frá donsku handlunum vóru partur av metingini.

## LIMASKAPIR

European Fishmeal and Fish Oil Producers · Vinnuhúsið – House of Industry · Lantra · Sedex

# Bakkafrost laksur í stuttum

## FØÐSLUVIRÐI

**125 g av Bakkafrost laksi gevur**
(samanborið við tilráddu mongd um dagin)

**OMEGA-3**
MIÐAL
**124%**

**OMEGA-3 TIL 6**
LUTFALL
**1,73**

**VITAMIN D**
MIÐAL
**126%**

**SELEN**
MIÐAL
**37%**



**PROTEIN**
**45%**

**VITAMIN B12**
MIÐAL
**310%**

**JOD**
MIÐAL
**42%**

**VITAMIN E**
MIÐAL
**68%**

Bakkafrost tøl útroknað við greining av heilum laksi frá 3-4 kg til 7+ kg.

Tilráðing pr. dag keldur: Nordic Nutrition 2012 og EFSA

# UMHVØRVI OG HEILSA

**ASC GÓÐKEND ALIBRÚK**
**100%**
Føroyar

**BAP**
★★★★
Skotland

**GÓÐKENDAR SKOÐANIR**
**100%**
á Bakkafrost í 2022

**NÝTSLA AV ANTIBIOTIKA**
**0**
Føroyar
**0**
Skotland

**VIÐGERÐ VIÐ HEILIVÁGI**
**2,7 g**
per tons · Føroyar
**0,39 g**
per tons · Skotland
Nýtsla hjá Bakkafrost ímóti lús í 2022

**FÓÐURFAKTOR LUTFALL**
**1,06**
Føroyar
**1,26**
Skotland
Per 1 kg av laksi
(1,2-1,5kg GSI miðal)

**UNDANKOMIÐ ÁRLIGA**
**95,09%**
Føroyar
**76,84%**
Skotland

**UNDANKOMIÐ PR. MÁNAÐ**
**99,6%**
Føroyar
**98,2%**
Skotland

**SLOPPIÐ**
**0**
Føroyar
**0**
Skotland
Tal av laksum

**TAL AV FISKALÚS**
**0,28**
Føroyar
**0,22**
Skotland
Miðal vaksnar kvennlýs pr. fisk í 12 mánaðir - øll alióki

**TÆTTLEIKI**
**6,79** $kg/m^3$
Føroyar
**8,31** $kg/m^3$
Skotland

GSI data: Global Salmon Inititative www.globalsalmoninitiative.org/en/sustainability-report/

# Sunn vinna

## Production

Mál
**150.000 t áðrenn 2026**

2022
**90.603t**

## Framleiddu

**> 2.000.000**
**Máltíðir um dagin**




**0**

## Eingi frávik:

- Ongar afturkallaðar vørur
- Onga útihýsan frá marknaðum
- Ongi trygdarbrot
- Ongin klaga móttikin viðv. brotum á mannarættindi

## Smolt stødd

Mál
**500g:**

FO 2023 · SCT 2026

2022

| FO | SCT |
| --- | --- |
| **345g** | **106g** |

## Kundanøgdsemi

**92%**

av kundunum hjá Bakkafrost vóru antin nøgd, meira enn ella sera nøgd

Bakkafrost Atferðarreglur

# Sunn fólk

Vit miða ímóti at vera ein arbeiðsgevari sum verður valdur framum, har øll kunnu arbeiða trygt og í einum fevnandi umhvørvi, sum stuðlar starvsfólki at taka ábyrgd og at vera stolt av teirra avrikum. Okkara fólk eru hjartað í fyritøkuni, og vit viðfara okkara starvsfólk rættvíst. Heilsa og trygd hjá okkara starvsfólki og teirra persónliga menning hevur sera stóran týdning, og verður hetta raðfest hvønn dag.

## Starvsfólk

**1.778**

KVINNUR **25%**
MENN **75%**

## Starvsfólka-útbúgving

**17,4**
Miðal undir-vísingartímar pr. ársverk

## Deyðsføll

**0**
2022
ONGI DEYÐSFØLL Í 2022

## Mannarættindi

**Zero**
**whistle blower reports**

## Sjúkrafrávera

2022
**4,53%**
SAMTAK

## TILSØGN UM JAVNSTØÐU

Hækka talið av kvinnum í leiðarastørvum (leiðarar við fólki undir sær) til í minsta lagi 25% innan árslok 2025

## Equality

KVINNUR
**25%**
av samlaðu arbeiðsfjøldini

**33,3%** Av nevndini
**20%** av øllum leiðarum við starvsfólki undir sær

## TÍTTLEIKI AV FRÁVERUSKAÐUM

LTIR PR MIÓ ARBEIÐSTÍMAR

**14,88**
SAMTAK

Vit eru limir í **Sedex** og vit virka í samsvari við **„Ethical Trade Initiative“**

# Sunnur laksur

## Antibiotika

| 0 | 0 |
|---|---|
| **FØROYAR** | **SKOTLAND** |

## LAKSUR, IÐ KOM UNDAN 2022

2022

**95,09%**
FAROE ISLANDS

**76,84%**
SCOTLAND

## LÚSATAL

2022

**0,28**
FØROYAR

**0,22**
SKOTLAND

## Í minsta lagi 98,2% av nøgdini í ringunum er sjógvur*




*Miðal við hámark av biomassa





## Høvuðsorsøkir til felli

**FØROYAR**

Aling á sjógvi
- Handfaring í sambandi við viðgerð
- Verri smolt góðska
- Sjúka (CMS)

Aling á landi
- Tekniskir trupulleikar
- Skerd rogngóðska
- Handfaring í sambandi við viðgerð

**SKOTLAND**

Aling á sjógvi
- Táknusjúka
- Handfaring í sambandi við viðgerð
- Flyting

Aling á landi
- Tekniskar avbjóðingar
- Flyting
- Vanskapan

## Átøk at minka um lívfrøðiliga váðan



- Rognkelsi
- Avskolan og feskvatns-viðgerð
- Størri smolt
- Lívfiskur
- Minka um tættleikan í ringunum
- Veterinerar heilsuætlanir



BAKKAFROST

ESTABLISHED 1968

# 100%

## ASC Certified

í Føroyum

## Góðkenningar

# Sunt umhvørvi

**Mál 2030**
Vav 1 & 2
-50%



**Mál 2030**
Vav 3
-52%

2021 → 2022
**+13%**
vav 1 & 2 útlát, sum er 0,5% hækking í útláti pr. tons av vørum

2021 → 2022
**-8%**
vav 3 útlát pr. tons av seldum vørum

## VAV 3 ÚTLÁT:




## Grønt ravmagn



**100%**
Skotland

**52%**
Føroyar

## ÚTLÁT AV VAKSTRARHÚSGASSUM




## VAV 3




SUNT UMHVØRVI

# Förka - Biogassverk



## Í 2022 FRAMLEIDDI FÖRKA

**2,3%**

av samlaðu
**GRØNU EL-ORKUNI**
(Føroyar)







## ALDUR LAKSUR ER TANN MEST EFFEKTIVA GAGNNÝTSLAN AV ANIMALSKUM PROTEINI

| | | Aldur Atlantslaksur | Hosnarungi | Svínakjøt | Neytakjøt | Lambskjøt |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **$CO_2$ ÚTLÁT** PER KG VØRA | Minst | 3,24 | 3.52 | 3,44 | 23,92 | 21.00 |
| **LAND** M²/100 G PROTEIN | Minst | 3,7 | 7,1 | 11 | 102 | 185 |
| **FÓÐURFAKTOR** LUTFALL (KG) | Hægst | 1,2 - 1,5 | 1,7-2 | 2,7-5 | 6-10 | Eingi dáta |
| **VATNNÝTSLA** LITRAR / KG MATVØRUR | Minst | 2.000 | 4.200 | 6.000 | 15.000 | Eingi dáta |
| **ÚRTØKA AV MATI** ÚRTØKA KJØT PR. KG FÓÐUR | Hægst | 68% | 46% | 52% | Eingi dáta | 38% |

$CO_2$-tølini eru bert galdandi fyri framleiðslu. Kelda: WWF Svøríki, Carboncloud og GSI

## Fóðurfaktor

bFCR

| Føroyar | Skotland |
|---|---|
| 1,06 | 1,26 |

Miðal í vinnuni 1,2-1,5 (GSI)

# Burðardygt fóður

**Plantuprotein og oljurí okkara fóðri frá Havsbrún**

- Alt er 'non-GMO'
- Soyabønir eru Pro-Terra, Europe Soya ella líknandi
- Eingin pálmaolja
- Ikki framleitt í økjum hótt av avskóging

**Marinar rávørur**

Meðan fóðurídnaðurin hevur alsamt størri fokus á at útskifta marinar rávørur, hevur Bakkafrost valt at halda fram við at nýta stórar nøgdir av marinum rávørum í fóðrinum av tí, at hetta yvirskipað er ein burðardyggari loysn vegna okkara staðseting. Atgongdin til lokala marina rávøru merkir, at marinu rávørurnar hava lutfalsliga lágt $CO_2$-útlát.

**Gransking og menning**

Fóðurmenning og betringar eru ein áhaldandi tilgongd á Havsbrún. Vit hava áhaldandi gransking og menningararbeiði, har vit gera fóðurroyndir til tess at betra fóðuruppskriftina, herundir royna vit nýggjar rávørur til fóðurframleiðslu.




## FÓÐURSAMANSETING Í 2022

Marinar rávørur **52%**

| Hveitivørur | Plantuoljur | Non-GMO Soya Protein | Marinar proteinir | Lýsi | Annað |
|---|---|---|---|---|---|
| **21,3%** | **13,5%** | **10,0%** | **38,3%** | **13,7%** | **3,31%** |
| (28.162 tons) | (17.843 tons) | (13.261 tons) | (50.630 tons) | (18.068 tons) | (4.384 tons) |

# Sunn samfeløg

Bakkafrost raðfestir lokalsamfeløgini, og vit eru errin av okkara uppruna og arvi. Vit ala í nøkrum av mest fjarskotnu økjunum bæði í Føroyum og í Skotlandi, og vit virða og eru tilvitað um okkara leiklut í lokalsamfeløgunum, har vit virka. Vit arbeiða miðvíst fyri at skapa vøkstur, men eru samstundis tilvitaði um, at okkara framtíðar virksemi er tætt samanbundið við samfeløgini, sum vit virka í.



## Lønir og skattir

Samtak

**832 MIÓ**

## Partafelags-, umsetnings- og vinningsbýtisskattur

**Umleið 739 MDKK**

## Vørur og tænastur, ið vórðu keyptar í lokalsamfelagnum

**60%**

## Stuðul latin

**4,5 MIÓ DKK**










- Landslið 20%
- Fótbóltsfeløg 19%
- Mentan og list 5%
- Umhvørvi og lívfrøðiligt margfeldi 31%
- Ítróttarfeløg 11%
- Sosial inklusjón av eldri borgarum og borgarum ið bera brek 3%
- Annað 8%
- Neyðhjálp 3%

- Mentan og list 30%
- Ítróttarfeløg 20%
- Umhvørvi og lívfrøðiligt margfeldi umframt "Salmon Scotland Wild Salmonid Fund" 50%

- Skúlafótbóltur 33%
- Munkebo Fótbóltsfelag 21%
- Danskir sjúkrahúsklovnar 7%
- Onnur ítróttarfeløg 39%



# Tiltøk



## MÓTTØKA - BAKKAFROST FINGIÐ FYRSTU ELRIKNU TVÍKILJUNA

Í september 2022 fekk Bakkafrost fyrstu elriknu tvíkiljuna nevnd „Grønarók". Í tí sambandi var hátíðarhald á skipasmiðjuni hjá MEST í Havn, har ymiskir áhugapartar luttóku og fingu møguleikan at royna tvíkiljuna.



## LAKSATORG

23. juli var Laksatorgið á skránni á Glyvrum, og í tí sambandi bjóðaðu vit gestum at vitja okkara høvuðsskrivstovu og okkara framleiðslu. Um 2.000 fólk komu á gátt og fingu eina rundvísing umframt smakkiroyndir.



## RUDDINGARÁTØK Í SKOTLANDI

Vit hava bundið okkum til at varðveita natúrliga umhvørvið í teimum fjarskotnu økjunum, har vit hava okkara virksemi. Í Skotlandi hava vit siðvenju fyri at skipa fyri ruddingarátøkum, og í 2022 skipaðu vit fyri sjey átøkum, har vit bæði syrgdu fyri arbeiðsmegi og útgerð.



## COWAL HIGHLAND GATHERING

Fyri níggjundu ferð á rað var Bakkafrost Scotland høvuðsstuðul hjá Cowal Highland Gathering, sum er eitt tiltak, ið hátíðarheldur skotska siðvenju innan ítrótt, matgerð og tónleik.



## RUDDINGARVIKA Í FØROYUM

Sum siðvenja er, skipaði Bakkafrost fyri ruddingarviku, har starvsfólk í samtakinum rudda ymisk øki, har Bakkafrost hevur virksemi. Millum annað vórðu leivdir av gomlu alistøðini í Svínoy ruddaðar.



## ISLE OF SKYE HALF MARATHON

Bakkafrost Scotland er høvuðsstuðul hjá Isle of Skye Half Marathon, sum í 2022 varð runnið í avbjóðandi umstøðum við regni og vindi. Kortini fingu rennararnir eina góða uppliving, umframt at tiltakið hevur týdning fyri lokalsamfelagið, har nógvir rennarar tóku av møguleikanum at uppliva tað, sum oyggin hevur at bjóða.




## LOCHCARRON GAMES

Bakkafrost Scotland var høvuðsstuðul av Lochcarron Games, ið eisini er eitt tiltak, ið hátíðarheldur skotska siðvenju. Um 2.000 fólk vitjaðu tiltakið, sum aftur var á skrá í fjør eftir trý ára steðg vegna korona-farsóttina.





## MUNKEBO SKÚLAFÓTBÓLTSLIÐ

Fótbóltsliðið hjá lokala skúlanum, Munkebo skole, í leikarablusum, ið Munkebo Seafood hevur stuðlað





# Grønarók – 100% elrikin tvíkilja




Í september 2022 var hátíðarhald á skipasmiðjuni hjá MEST í Havn, har MEST handaði Bakkafrost fyrstu føroysku elriknu tvíkiljuna, nevnd „Grønarók". Elrikna tvíkiljan er úrslitið av samstarvi millum Bakkafrost og Norðurlendska Ráðharraráðið, Føroya Landsstýri og SEV.

Verkætlanin at byggja eina elrikna tvíkilju var partur av orkuverkætlan hjá Norðurlendska Ráðharraráðnum, ið hevði til endamáls at finna grønar orkuloysnir til fjarskotin øki, og Bakkafrost játtaði luttøku í verkætlanini og játtaði at keypa tvíkiljuna, tá hon var liðugt bygd.

Skipasmiðjan MEST vann útboðið at byggja tvíkiljuna, og eru tey nú at rokna sum slóðbrótarar og undangongufólk á økinum at byggja elriknar bátar til alivinnuna.

Í samstarvi við MEST skipaði Bakkafrost fyri hátíðarløtu, har tvíkiljan alment varð handað Bakkafrost.

Tvíkiljan er nú partur av flotanum av tvíkiljum á aliøkinum Gulin í Havn.

# Bakkafossur



Í desember 2022 legðist 109-metrar langa brunnskipið "Bakkafossur" afturat flotanum hjá Bakkafrost. Skipið er eitt av størstu brunnskipum í alivinnuni.

Bakkafossur kann føra upp til 1.000 tons av livandi fiski, og er mettur at vera eitt stórt framstig í at tryggja burðardygga framleiðslu í framtíðini.

Skipið kann framleiða upp til 6.000 tons av feskvatni um døgnið, og harvið er kapasiteturin til feskvatnsviðgerð munandi øktur í føroysku framleiðsluni. Feskvatnsviðgerð er sera týdningarmikil liður í arbeiðinum at tryggja góða fiskaheilsu, og styrkir millum annað toknustøðuna hjá laksinum.

Bakkafossur er eisini útgjørdur við útgerð til mekaniska viðgerð og styrkir lívfrøðiligu trygdina í framleiðsluni, sum er í tráð við burðardygdsætlanina hjá Bakkafrost.

Bakkafossur er eisini eitt framstig á leiðini at nýta grønar orkukeldur á maritima økinum. Afturat teimum fimm diesel generatorunum er skipið útgjørt við battarískipan, ið tryggjar upp til 20% sparing í oljunýtslu. Staðsetingin av motorunum ger, at tað er lætt at skifta til 100% grøna orkuloysn, tá slíkar eru til taks á marknaðinum.

Bakkafrost P/F • Bakkavegur 9 • PO Box 221 • FO-625 Glyvrar
Tel +298 40 50 00 • Fax +298 40 50 09 • bakkafrost@bakkafrost.com • www.bakkafrost.com